# Snældan: Familjufyritøkan virkin um jóltíðir



Tógvvirkið Snældan á Strondum er ein verulig familjufyritøka. Karl Jóhan Olsen, sum eigur virkið, er vaksin upp í fyritøkuni. Fólkini, sum arbeiða hjá honum eru øll onkursvegna í familju við Karl Jóhan.
Tey á Snælduni merkja eisini væl á søluni, at jól eru fyri durum.
- Vit selja nógv til jólar. Tað eru serliga troyggjur og onnur klæðir, sum er vælumtóktar jólagávur. Ta klassisku føroysku troyggjurnar selja altíð væl. Vit hava eisini fingið okkurt nýtt snið til jólar, sigur Karl Jóhan.
Tey arbeiða eitt sindur yvir á jólum. Handilin er Strondum er tó einans opin vanligar tíðir.
- Vit selja ikki so nógv í handilinum á Strondum. Størsti parturin er tað, sum vit framleiða á Strondum og senda út til aðrar handlar, sigur Karl Jóhan.
Vøran hjá teimum selur ymiskt í mu til, hvør tíð á árinum tað er.
- Vit selja nógv tógv til hondbinding um vetrartíðina, men ikki í desember. Tá er tað serliga lidnar vørur, sum helst verða givnar í jólagávu. Um summarið selja vit eisini nógvar troyggjur til ferðafólkini. Tað er mest sum ein endurtøka hvørt ár, sigur Karl Jóhan.

























